Sniðgøta. *Leiðslan á postverkinum leggur botn í sparingarnar:*

Heitir á starvsfólk eitt og eitt um at fara niður í tíð

Starvsfólk eru misnøgd við hesa mannagongd, men aftra seg við at muta ímóti. Mannagongdin er ókend fyri postfelagnum

Tað skal nógv til, áðrenn Postverk Føroya fær endarnar at røkka saman.

So nógv, at leiðslan stúrir fyri, at tað verður ikki lætt at skerja, uttan at fáa álvarsligar trupulleikar við postfelagið, sigur ein álítandi kelda fyri Sosialinum.

EITT OG EITT

Tí roynir leiðslan seg í fyrsta lagi við eini loysn, har starvsfólk - eitt og eitt - verða prikaði á herðarnar og spurd, um tey sjálvboðin vilja arbeiða færri tímar hvørja viku.

Keldan, sum Sosialurin hevur tosað við, sigur, at fólk eru sera misnøgd við hesa mannagongd, og í onkrum føri hevur øsing staðist av.

TORA IKKI AT MÓTMÆLA

- Men mark er fyri, hvussu nógv fólk tora at gera burturúr, nú vandi er fyri at verða sendur til hús, sigur kelda okkara.

Esbern Midjord, stjóri, sat á fundi, tá vit ringdu fyri at fáa eina viðmerking.

SPILDURNÝTT

Á Postfelagnum var svarið soljóðandi:

- Hatta er spildurnýtt fyri okkum, svaraði ein nevndarlimur og vildi vita, hvaðani vit høvdu tíðindini.

Um so er, at leiðslan roynir einstaklingavegin, áðrenn man fer undir eina samstarvs-loysn við Postfelagið, hvat er so tykkara reaktión?

- Hatta er so nýtt fyri okkum, at tú mást ringja aftur í morgin...

...og tað fara vit sjálvsagt at gera.

ówh



Leiðslan á postverkinum spyr nú fólk eitt og eitt, um tey vilja arbeiða færri tímar. Eitt møguligt alternativ er arbeiðsloysi (myndin er tilvildarliga vald)

sosialurin

— altíð fyrstur við tíðsíðsta!



Gerist haldarar **NÚ**
— og fáið alt hetta:

Einsamøll
— eingi tíðindi

— 5 bløð um vikuna í 3 mánaðir fyri **bert 195,-**

Haldið so:
tíðindablaðið
sosialin
og fáið henda góða vinin — Føroya mest lisna og mest endurgivna blað
5 ferðir um vikuna
fyri bert **½ søluprís!**

Haldið blaðið
- ✱ við teimum fjølbroyttu tíðindunum
- ✱ við besta trúvirðinum
- ✱ sum birtir upp undir skilagott og mennandi kjak
- ✱ sum er blað fólksins

tíðindablaðið sosialurin *sjálvandi*

- sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin -

Ja! Eg gerist haldari av Tíðindablaðnum Sosialinum og fái blaðið **5 ferðir um vikuna.**
Haldaragjaldið er kr. **195,-** fyri ársfj.
Haldarar uttanlands gjalda kr. **230,-**/ársfj.
Goldið verður ongantíð fyri fleiri bløð enn tey, ið eru eftir at koma í einum ársfjórðingi.

Navn: _____

Bústaður: _____

Bygd/býur: _____

Kannað postverkinum

Okeypis Sosialurin rindar postgjaldið
64

tíðindablaðið sosialurin
Box 76
110 Tórshavn